KAROLINA MATRAS, LESIGRANSKARI

STÓRUR DENTUR MÁ LEGGJAST Á, AT NÆMINGARNIR GERAST DUGNALIGIR OG SJÁLVSTØÐUGIR BRÚKARAR AV SKRIFTMÁLINUM, OG FAKLIG LESING OG SKRIVING EIGUR AT FÁA EITT ÁSÝNILIGT PLÁSS.

Í øllum lærugreinum má faklig lesing og skriving gerast týðilig, og brúk av fakmáli, t.d. í støddfrøði og náttúrulærugreinunum og krøvini til næmingarnar at duga at brúka málið í lærugreinunum, má gerast størri. Næmingarnir skulu ikki einans vísa eina fakliga vitan, men eisini málsliga duga at greiða frá, lýsa, próvføra, kjakast osfr.

Allar lærugreinir skulu vera við at menna málsligu menningina hjá næminginum og harvið eisini lesi- og skriviførleikan.

Í útbúgvingini hjá námsfrøðingunum má málsliga økið gerast týðiligt so námsfrøðingarnir kunnu seta málsligu menningina hjá barninum í brennidepulin úti á stovnunum.

Eisini í ungdómsútbúgvingunum kenna vit til mál- og lesitrupulleikar. Serliga hava vit hugt at vinnuligu útbúgvingunum, tí nógv lesandi ikki fingu úrslitini, sum tey væntaðu. Vit síggja sama rákið bæði á øðrum ungdómsútbúgvingum og útbúgvingum fyri vaksin.

Fleiri lesandi lesa ikki nóg væl og hava ikki málsligu førleikarnar, sum eru neyðugir, um tey skulu fáa góð úrslit í útbúgvingunum.

## HVAT VERÐUR GJØRT Á ØKINUM?

Tað verður ein stór avbjóðing at vera við at lyfta hesar uppgávur. Lesivegleiðararnir, sum í hesum skúlaári verða lidnir, koma at hava ein lyklaleiklut í hesum sambandi. Hetta fara teir at gera í arbeiði teirra at vegleiða bæði í læraratoymunum og tá ið teir arbeiða saman við einstaka læraranum og skúlaleiðaranum. Vit mugu seta mál-, lesi- og skrivimennandi undirvísing á dagsskránna í øllum lærugreinum.

T.d. kann verða skipað fyri skeiðum fyri lærarum í fólka-, miðnáms- og yrksiskúlunum, har dentur verður lagdur á at arbeiða við menning av máli, lesi- og skriviførleikanum hjá næminginum og týdninginum, sum skriftmálsligi førleikin hjá næminginum hevur fyri læring í øllum lærugreinum. Dentur eigur at verða lagdur á leiklutin hjá lærarum í øllum lærugreinunum at menna málsligu førleikarnar hjá næmingunum. Námsfrøðingar eiga eisini at fáa høvi at koma á skeið at fáa vitan um menning av málinum hjá barninum á dagstovninum.

Neyðugt er at gera granskingar- og menningararbeiði um samanrenningina av máli, lesing og skriving í báðum útbúgvingunum.

Arbeiðast kann við máli og sløgum av tekstum í undirvísingini í øllum lærugreinum við støði í gransking, ið er gjørd á økinum t.d. Derewianka, 1990, Arnbak, 2003, Martin & Rose 2005, Rose, 2005, Maagerø, 2005, 2006 & Gibbons, 2006, Mulvad, 2009.

## VITAN UM MÁLIÐ Í LÆRUGREINUNUM

Tað kann tykjast møtismikið hjá lærarum, sum ikki eru so kønir í ástøði um mál at ogna sær vitan um mál í teirra lærugrein í so stóran mun, at teir eru førir fyri at brúka hesa vitan um

málið í undirvísingini. Spurningurin er so, hvussu til ber at eggja lærarum at fara undir hetta arbeiðið?

Arbeiðast má við at breiða út hugsanir um málsliga økið og gera vitanina atkomuliga fyri lærarum. So við og við mugu lærararnir læra seg, hvussu málið verður nýtt í teirra lærugrein og ogna sær vísindi um málið.

Sera týdningarmikið er at leggja dent á:

- Kunnleika fólkaskúlalærarans um menningina av bæði málsliga førleikanum og lesi- og skriviførleikanum hjá næminginum
- Kunnleikan, sum námsfrøðingar á dagstovnum hava um málsliga menning hjá børnum
- Leiklutin hjá linjulærugreinalærarum á Føroya Læraraskúla at menna málsliga førleikan hjá teimum lesandi í avvarðandi lærugrein
- Í útbúgvingini hjá námsfrøðingunum at kunnleikin um málsliga menning og málsliga stimbran á dagstovni fáa stóra rúmd.

Nevndu átøk kunnu t.d. fremjast við tvørfakligari fatan av tí málsliga í einstøku lærugreinunum. Dentur eigur at leggjast á lesifatan, har aktiv læring og relatiónir eru í brennideplinum.

### Hvørji eru krøvini til okkara næmingar í dag?

Tað er sera týdningarmikið at gera sær greitt, hvørji krøvini til næmingarnar í dagsins samfelag eru: tey skulu sum áður sagt m.a. duga at lýsa, greiða frá og grunda um tað, ið lisið verður. Tí má lærarin leggja høvuðsdentin á at vera týðiligur, tá ið tað um ræður málsliga menning.

Um vit hugsa um, at talan her er um kjarnuførleikar bæði í allari skúlagongdina hjá børnum og ungum og restina av arbeiðs- og vaksnamannalívinum annars, er sera týdningarmikið, at okkara námsfrøðingar og lærarar eru væl skúlaðir á hesum øki. Tí eiga hesi evni at vera kravd bæði á grund- og linjulestrinum á Føroya Læraraskúla.

Tey lesandi sjálvi hava eisini tørv á at hugsa um egið skriftmálsbrúk í útbúgvingini, tí tað er ein sannroynd, at fleiri lesandi hava trupulleikar, tá ið tey lesa fakligar bókmentir og hava eisini tørv á at brúka skriftmálið ikki bara til uppgávur, men eisini at læra við, t.d. í loggbókskriving.

Eisini er týdningarmikið at styrkja málmennandi arbeiðið hjá teimum lesandi sjálvum í bæði føroyskum, mentan og samskifti, samstundis sum arbeitt verður við málsligu menningini, spírandi skrivingini og lesingini hjá barninum.

Hetta arbeiði fer ikki bert at vera við at gera tey lesandi til góðar námsfrøðingar og lærarar, men verður eisini avgerandi í góðskumenningini av útbúgvingunum á henda hátt:

- Fleiri fólk ynskja at koma inn á eina útbúgving, sum leggur so stóran dent á persónligu menningina hjá tí lesandi sjálvum
- Færri lesandi falla frá, um tey fáa góð amboð at fremja lesnaðin
- Tá skipað verður fyri eftirútbúgvingum av lærarum og námsfrøðingum saman við teimum lesandi um hesi evni, verða samvirkandi fyrimunirnir eyðsýndir. Eisini fer tað at geva verandi námsfrøðingum og lærarum stóran íblástur í dagliga arbeiðinum
- Hetta kann eisini vera við at leggja lunnar undir menningarverkætlanir á stovnum og skúlum framyvir

Tørvur er eisini á tilboðum til lærarar á yrkiskúlum og víðari útbúgvingum, tá ið um ræður at menna og styrkja fakliga málið, lesingina og skrivingina hjá teimum lesandi. T.d. kann í

ungdómsyrkisskúlunum vera trupult at fáa tey lesandi at støðast. Vit mugu hava í huga, at nógv vaksin hava stórar skriftmálsligar trupulleikar.

Tørvur er eisini á granskingar- og menningararbeiði um samskipan av máli, skriving og lesing í ymisku útbúgvingunum. Okkum tørvar íblástur um undirvísing, sum á munadyggan hátt samantvinnar fakliga lesing og málsliga menning í lærugreinunum. Eitt evni til menningararbeiði kundi verið mál, skriving og lesing í øllum lærugreinum. Hvussu kunnu lærarar, sum ikki eru so kønir í máli, ogna sær vitan um málið í teirra lærugrein, soleiðis at teir gerast førir fyri at brúka hetta í síni undirvísing? Hetta hevur stóran týdning, um lærarar skulu hætta sær undir at fara undir tilvitað at gerast varugir við málið í teirra lærugrein. Um hetta eydnast, duga hesir lærarar at síggja málið sum yvirskipað amboð at brúka í undirvísingini.

Tað, sum hevur týdning fyri læraran, er at vita, hvussu hann á bestan hátt arbeiðir við máli bæði í egna flokki sínum og í skúlanum sum heild. Málslig og faklig menning má setast á breddan við málsligari samvirkan í øllum lærugreinum.

Arbeiðast kann við:

- At lesa fyri at læra. Hetta ger nemingin føran fyri at lesa og skriva aldursvarandi í øllum lærugreinum
- Nemingalagaðari undirvísing, har lærarin stuðlar neminginum, har hann er
- Mállæruundirvísing, sum verður knýtt at nýtsluni av málinum
- Munnligari og skrivligari tilgongd til tekstasløg, sum mennir hugin at arbeiða við øllum sløgum av bókmentum
- Vælvirkandi arbeiðstilgongdum í flokshølinum
- Upplivingum hjá neminginum, sum ger at hann kennir, at arbeiðið eydnast
- Miðvíst við fakligari lesing og skriving at nemingalaga undirvísingina so allir nemingar fáa hóskiliga avbjóðing

Hugt eigur eisini at vera at, hvussu vit á besta hátt seta í verk arbeiði við strategium við tí endamáli, at nemingurin skal kenna, at hann dugir og harvið fær hug at læra.

Dentur má leggjast á, at:

- Lærarin sleppur á skeið í fakligari lesing
- Lærarin áhaldandi fær stuðul, meðan hann roynir henda nýggja arbeiðsháttin í verki
- Eftirmeting verður gjørd av arbeiðinum við atliti til, hvønn týdning hetta hevði fyri góðskuna av undirvísingini, og hvat nemingar og lærarar fingu burturúr
- Skúlaleiðsla og skúlamyndugleikar meta um og vísa hesum arbeiðshátti áhuga

Sjálvsagt eru fleiri hættir at arbeiða við hesum. Arbeiðast kann t.d. við eftirútbúgvingarskeiðum fyri lærarum ella menningararbeiði á skúlunum. *Avgerandi er, at farið verður undir at gera broytingar í arbeiðinum aktivt at brúka málið og skriva og lesa í øllum lærugreinum.* Um fáast skal sum mest burturúr, eiga vit at seta okkum mál, sum kunnu røkkast í einum rímiligum tíðarbili. Hetta kundi t.d. verið:

- Tvørfakligt samstarv, har vit saman geva okkum far um málið í t.d. tekstunum í lærugreinini
- Arbeiða fram í móti at fáa samvirkandi fyrimunir
- Í samstarvinum um ymsu lærugreinarnar at fáa avbjóðingar, ið víðka fakliga sjónaringin
- Tosa seg til rættis um, hvussu hetta kann førast út í lívið
- Eftirmeta samstarvið og avbjóðingarnar

## Bókmentir


Arnbak, Elisabeth (2003). *Faglig læsning – fra læseproces til læreproces*. Gyldendal

Brudholm, Merete (2002). *Læseforståelse – hvorfor og hvordan?.* Alinea

Bråten, Ivar (red.) *Leseforståelse i kunnskapssamfunnet – teori og praksis*. Cappelen 2007

Derewianka, Beverly (1990). Rocks in the Head: Children and the Language of Geology. Í: Carter, R. (red.): *Knowledge about Language and the Curriculum.* Hodder & Stoughton

Gibbons, Pauline (2006). *Bridging discourses in the ESL Classroom. Students, Teachers and Reseachers.* Continuum

Maagerø, Eva (2005). *Språket som mening. Innføring i funksjonell lingvistikk for studenter og lærere.* Universitetsforlaget

Maagerø, Eva (2006). *At lese i alle fag.* Universitetsforlaget

Martin, Jim R. og David Rose (2005). Designing literacy pedagogy: scaffolding asymmetries. R Hasan, C M I M Matthiessen & J Webster (ritstj.) *Continuing Discourse on Language*. Equinox. 251-280,

Mulvad, Ruth (2009). *Sprog i skole. Læseudviklende undervisning i alle fag*. Alinea

Rose, David: Democratising the classroom: a literacy pedagogy for the new generation. Í: *Journal of Education, No. 37*, 2005